Vinnan

VINNUTÍÐINDI í Sosialinum fast hvønn týsdag – eisini aðrar dagar

# Havsbrún og skipini mugu fáa betri prís

*Nóta- og trolskipini góvust at fiska, tí oljan er so dýr, men oljuprísurin tyngir eisini Havsbrún í Fuglafirði*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



**Tann høgi oljuprísurin tyngir ikki bara skipini, men eisini virkið í Fuglafirði**

VINNAN
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Fyrra hálvár royndist ikki væl hjá Havsbrún í Fuglafirði, hvat nøgd viðvíkir, og tað er longu nú greitt, at seinna helvt fer at ikki at broyta heildarúrslitið stórvegis.

Til tann 30. juni fekk virkið í Fuglafirði góð 170.000 tons, og tað er heili 20 prosent minni enn somu mánaðir í fjør. Útlitini fyri nakrari stórvegis broyting eru heldur ikki tey bestu, ásannar stjórin, Bergur Poulsen, sum væntar, at virkið fer at fáa umleið 200.000 tons í ár. Og tað er 55.000 tons minni enn í 2007.

Tey seinastu trý árini hevur Havsbrún drigist við sera skiftandi viðurskifti á marknaðinum. Í 2006 hækkaðu prísirnir, men í fjør fullu teir aftur. Teir góðu prísirnir í 2006 gjørdu, at fiskamjøl prísaði seg út av marknaðinum, sum sagt verður, og í fjør var sera torført at sleppa av við fiskamjøl yvirhøvur. Higartil í ár hevur mjølmarknaðurin verið stirvin og trupul, men Bergur Poulsen væntar, at marknaðurin fer at batna eitt sindur seinni í ár. Støðan á lýsimarknaðinum er heldur frægari og er hampiligur í løtuni.

Herfyri valdu nóta- og trolskipini at gevast við fiskiskapinum, tí oljan var vorðin so dýr, men stjórin á Havsbrún sigur, at tað er ikki bara skipini, sum mugu fáa betri prís. Støðan er tann sama hjá einum virki sum Havsbrún, og skulu skip og virkir fáa endarnar at røkka saman, mugu prísirnir upp. Stjórin á Havsbrún er bjartskygdur:

-Hetta er ikki ein serføroyskur trupulleiki, men ein globalur trupulleiki, og vit vænta, at marknaðirnir fara at laga seg eftir teimum broyttu fyritreytunum. Tað er bara ein spurningur um tíð, sigur Bergur Poulsen at enda við Sosialin.

# Fyrrverandi ráðgevar mæla íslendsku stjórnini til at søkja limaskap í ES

**Tveir fyrrverandi íslendskir stjórnarráðgevar skjóta upp, at íslendska stjórnin eigur at fyrireika umsókn um limaskap í ES fyri at fáa støðug viðurskifti í búskapinum og fyri at tryggja landsins bankar**

VINNAN
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tilmælið frá teimum báðum fyrrverandi stjórnarráðgevunum stóð í einari grein, sum teir báðir høvdu í Morgunblaðnum nú um dagarnar. Greinin vakti ans, tí tað var ikki hvør sum helst, sum stóð undir henni. Høvundar vóru tveir av teimum mest royndu stjórnarráðgevunum í Íslandi, fyrrverandi tjóðbankastjórin Jónas H. Haralz og tann royndi diplomaturin Einar Benediktsson.

Í greinini gera teir báðir nógv burtur úr íslendska búskapinum, sum hevur víst fleiri veikleikar í seinastuni, og teirra niðurstøða er, at tað ber ikki til at loysa trupulleikarnar og at tryggja varandi støðug viðurskifti uttan limaskap í ES.

Jónas H. Haralz og Einar Benediktsson skriva, at tað hevði verið eitt gott tekin, um sitandi stjórnin fór undir at fyrireika umsókn at senda til Bruxelles, tí tað hevði víst, at stjórnin er sinnað til at tryggja búskapin og fíggingarstovnarnar.

Teir báðir royndu ráðgevarnir leggja afturat, at tættari samband við Evropasamveldið hevur erisini fingið størri týdning, eftir at amerikanararnir eru farnir úr Íslandi.



*Jónas H. Haralz (vinstrumegin á myndini) mælir íslendsku stjórnini til at søkja um limaskap í ES*

*Mynd: Vísir*